# Innbrotið hjá Bergtóru loyst

**Í Føroya Rætti fríggjadagin var ein ungur maður ákærdur fyri nógv umrødda innbrotið hjá Bergtóru Óladóttir Poulsen. Dna-royndir staðfesta, at maðurin er sekur, men ósemja var um endurgjaldskravið, og tí fellur dómur ikki fyrr enn seinni**

Leo Poulsen

Náttina 14. februar í ár varð brotið inn í húsini hjá Bergtóru Óladóttur Poulsen, og málið fekk nógva umrøðu í miðlunum, tí tað var so óvanligt.

Bergtóra sjálv var og ferðaðist um hetta mundi og var tí ikki inni, tá innbrotið varð framt. Men innbrotsmaðurin hevði gjørt nógv um seg, og byrjaði við at steina rútin í úthurðini inn. Har hevði hann skorið seg, og blóð var klínt um veggir og innbúgv.

Hvussu leingi maðurin hevur verið inni í húsunum er ilt at meta um, men tað heilt løgna var, at hann var farin undir brúsu, meðan innbrotið var framt. Sjálvur sigur maðurin seg einki minnast frá kvøldinum, tí hann var so fullur. Maðurin greiddi frá, at hann vanliga ikki drekkur, og at hetta bert var fimta ferðin, at hann hevði verið fullur.

Maðurin hevði eisini stolið nakrar lutir, og teir vóru so løgnir sum tvey dýnuvørð, tvey løk og eina mynd.

Maðurin greiddi frá, at hann hevði ikki verið inni í húsunum áður, men at hann visti um húsini, tí hann einaferð hevði arbeitt uttan fyri har. Hetta brúkti ákærin eisini sum prógv um, at tað verðuliga var rætti maðurin, ið løgreglan hevði fingið fatur á, tí dna-royndirnar prógvaðu, talan var um rætta mannin.

Sum nevnt segði maðurin seg einki minnast, hóast hann hevði verið undir brúsu, og tí fekst einki boð um, hvør motivatiónin handan innbrotið var. Tað visti maðurin einki um at siga.

### Anonymt tip

Løgreglan hevði ikki so nógv spor at ganga eftir í málinum, tí hóast dna-royndir vóru fingnar av blóðinum, so mátti onkur persónur finnast, sum átti hetta dna'ið.

Karl Johansen, løgregluassistentur og núverandi sýslumaður, fekk 2. mars eina anonyma uppringing um, at navngivin persónur var hin seki. Spurdur, hvussu hesin visti, at hetta var rætti persónurin, svaraði hann bara, at tað mátti løgreglan sjálv finna útav, og síðani legði hann hornið á.

Karl Johansen greiddi síðani frá, at eftir morgunfundin dagin eftir koyrdu hann og ein annar løgreglumaður á givnu adressuna, og spurdu eftir manninum, sum enn ikki var uppi tá.



Maðurin var tó skjótur, men tá løgreglan spurdi hann, um hann visti hví teir vóru har, svaraði hann nei. Maðurin hevði rímiliga nýggj skurðsár á arminum, og spurdur váttaði hann, at hann hevði fingið tey nevnda vikuskifti.

Løgreglan gjørdi tí av at taka mannin við á løgreglustøðina til avhoyringar, og har varð hann so skuldsettur fyri innbrotið.

### Endurgjald

Fríggjadagin var málið so fyri í Føroya Rætti. Ákærdi maðurin og løgreglumaðurin vóru einastu vinti, umframt Bergtóru Óladóttir Poulsen, men ákærdi maðurin var ikki til nógva hjálp, hvørki hjá ákæra ella verja. Hann segði seg stutt sagt einki minnast frá hendingini.

Skaðin var tó umfatandi. Blóð var smurt eftir veggjum og innbúgvi, og millum annað var sofan og seingin blóðdálkað, so neyðugt var at skifta hetta út.

*Málið um innbrotið hjá Bergtóru Óladóttir Poulsen varð avgreitt í Føroya Rætti fríggjadagin*

Tryggingarfelagið Føroyar setti fram endurgjald móti manninum, og higartil hevur felagið lagt út 85.644 krónur. Hartil kemur so eitt endurgjaldskrav frá Bergtóru Óladóttir Poulsen upp á 28.013 krónur fyri nýggja song og nýggja sofu.

Her var tó nakað av iva um, antin sofan var íroknað tað endurgjaldið, ið Bergtóra Óladóttir Poulsen hevði fingið.

Sjálvt um Bergtóra ikki vildi nýta blóðdálkaðu seingina, vildi tryggingin ikki dekka hetta, og tí verður tað kravið sett fram móti ákærda.

Ein stór orsøk til, at endurgjaldskravið gjørdist so stórt, var, at ákærdi hevði hvølt tveir mjólkarpakkar sum høvdu runnið niður undir í kjallaran, har Bergtóra hevur handil. Tí mátti stórur partur av loftinum skiftast.

Men meðan eingin ivi kann vera um skuldarspurningin, vildi dómarin hava stundir til at umhugsa endurgjaldskravið, og tískil verður dómur ikki sagdur í málinum, fyrr enn seinni í vikuni.

---

# Ákærdur fyri at dálka drekkivatn

**Ein bóndi er ákærdur fyri at leggja mykju ov nær vatni, sum verður nýtt til drekkivatn. Bóndin sigur seg einki hava gjørt øðrvísi, enn hann hevur gjørt í 25 ár**

Leo Poulsen

Ein bóndi var í Føroya Rætti fríggjadagin ákærdur fyri brot á umhvørvislógina. Kommunan og politiið skuldsettu bóndan fyri at leggja mykju ov nær einum vatni, sum verður nýtt sum drekkivatn, og boð vóru givin um at fáa mykjurúgvuna flutta.

Mykjurúgvan lá í einum skráningi oman móti vatninum, og ákærin førdi fram, at kom glopraregn, kundi mykjurúgvan verða skolað oman í vatnið, sum harvið varð dálkað.

Vandi var tískil fyri, at mykjan kundi dálka drekkivatnið hjá fólkinum í bygdini.



*Bóndin skuldi brúka mykjurúgvuna til at tæða bøin við*

Modellmynd

Mykjurúgvuna skuldi bóndin annars brúka til at tæða bøin har nærhendis, og tað metti ákæruvaldið eisini skapti ein vanda fyri, at mykja varð sprænd í vatnið.

Tað var 2. mai 2009, at bóndin bleiv steðgaður og skuldsettur fyri brot á umhvørvislógina. Sjálvur helt bóndin lítið um ákæruna, tí hann sigur seg hava lagt mykju har um leiðir í 25 ár, uttan at tað hevur verið mett sum vandi fyri umhvørvisdálking.

Somuleiðis fíltist bóndin á, at hann ikki sjálvur fekk møguleika at beina mykjuna burtur.

Myndir av mykjurúgvuni vórðu lagdar fram í rættinum, men meðan ákæruvaldið metti rúgvuna vera um seks til sjey kubikkmetrar, metti bóndin rúgvuna til umleið tveir kubikkmetrar.

Umrødda vatnið liggur í haganum hjá bóndanum, og spurningurin kom upp í rættinum, um bóndin hevði lagt mykjurúgvuna so nær vatninum í einari provokatión móti kommununi, tí hon ikki hevði vilja gjørt nakra avtalu við bóndan um at taka drekkivatn út vatninum. Men hesum vísti bóndin aftur og staðfesti, at soleiðis hevði hann gjørt í 25 ár.

Verjin hjá bóndanum vísti eisini á, at vatnið var bæði stórt og djúpt, og at inntakið til drekkivatnið var minst 80 metrar inn í vatnið.

Ákærin kravdi bóndan dømdan eftir ákæruritinum og mælti til eina bót á 5.000 krónur. Verjin hinvegin kravdi frídøming. Dómurin fellur seinni í vikuni.